# Almannaráðharrin skal svara í næstu viku

**Fólkatingslimurin hjá Eindarlistanum, Line Barfod, hevur sett Evu Kjer Hansen, almannaráðharra, fyrispurning, har ráðharrin verður biðin um at greiða frá málinum um lítla Petur, og hvat hon kann gera í málinum**

LÍTLI PETUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Line Barfod, sum umframt at verða limur í almannanevndini hjá Fòlkatinginum eisini situr í sonevndu Føroyanevndini, sigur, at soleiðis sum málið um lítla Petur er lýst í donskum fjølmiðlum, tykist tað verða fullkomiliga burturvið, at drongurin er fluttur á stovn í Danmark.

### Loysa trupulleikarnar í Føroyum

- Tá ið man velur at gera eina so umfatandi broyting í lívinum hjá einum lítlum drongi, má tað verða ein orsøk til tess, men sum málið er lýst í miðlunum, er tað eisini nógv, ið bendir á, at Petur skuldi verið verandi í Føroyum. Eitt er, at hann verður fluttur so langt heimanífrá, men hann verður enntá skildur frá tvíburðasystur síni, sigur Line Barfod í telefonini úr Danmark.

Fólkatingslimurin hjá Eindarlistanum heldur tó eisini, at málið setur nakrar meiri generellar spurningar, ið eiga at takast upp til viðgerð.

- Hetta mál vísir, at Føroyar í løtuni ikki hava møguleika fyri at taka sær av børnum við slíkum trupulleikum, og so verða tey send av landinum. Spurningurin er, hvat vit kunnu gera fyri at hjálpa Føroyum, soleiðis at føroyingar sjálvir verða førir fyri at taka sær av hesum børnum, sigur Line Barfod.

Line Barfod hevur sett spurningin í vikuni, og hon sigur seg vænta, at almannaráðharrin fer at koma við einum skrivligum svari í komandi viku.



*Line Barfod hevur biðið Evu Kjer Hansen, almannaráðharra, at greiða frá málinum um lítla Petur, og hvat hon kann gera við málið*



*Borgarstjórin í Gøtu kommunu, Páll Isholm, sigur, at kommunan fyrst í komandi ári fer undir at gera eitt vinnuøki í Gøtudali, og har kann Aluplast fáa øki, um tað er áhugi fyri tí.*

# Gera vinnuøki í Gøtudali

**Borgarstjórin í Gøtu kommunu, Páll Isholm, sigur tað verða harmiligt, um Aluplast flytir úr kommununi, tí fyrst í komandi ári verður farið undir at gera vinnuøki í Gøtudali, og har kann Aluplast fáa øki til nýggjan bygning**

VINNULÍV
*Terji Nielsen*

Aðrastaðnis á síðuni førir stjórin í Aluplast í Gøtu, Magnus Gregersen, fram, at fyritøkan, sum júst hevur selt bygningin hjá sær í Gøtudali, eins væl kann halda fram við virksemi sínum í til dømis Havnini í staðin fyri í Gøtu, sum nú er. Hetta harmar Páll Isholm, borgarstjóra í Gøtu, tí Aluplast er eitt rímuliga stórt arbeiðspláss, og tað hevði verið harmiligt, um hesi fluttu úr kommununi, heldur Páll Isholm.

### Stórur áhugi fyri vinnuøki

- Gøtu kommuna hevur í ár sett 450.000 krónur av til projektering av einum nýggjum vinnuøki í Gøtudali, og fyrst í komandi ári verður farið undir arbeiði við at gera vegir og tílíkt, sigur Páll Isholm.

Borgarstjórin í Gøtu sigur, at tað er stórur áhugi fyri vinnuøkinum, og kommunan ætlar at fáa tær fyritøkur, sum eru áhugaðar, at gera avtalu við kommununa sum skjótast, so at tey einstøku grundøkini kunnu planerast beinanvegin.

Ætlanir eru eisini um at gera eina rundkoyring í Gøtudali við tunnilsvegin til Leirvíkar, og Páll Isholm sigur seg vóna, at hetta verður gjørt sum skjótast.

- Vit hava eitt samstarv við Landsverk um eina rundkoyring, og eg vóni, at hon verður klár, tá ið norðoyatunnilin letur upp, tí tá fer ferðslan ivaleyst at vaksa nógv, og tí verður stórur tørvur á eini slíkari, sigur Páll Isholm.

# Ludvík keypt bygningin hjá Aluplast

**Nú er bygningurin hjá Aluplast í Gøtudali endaliga seldur. Tað er Ludvík Petersen í Havn, sum hevur keypt bygningin**

VINNULÍV
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Fyrr í ár skrivaðu vit her í blaðnum, at Aluplast hevði selt bygningin hjá sær, men tað var ikki heilt rætt. Samráðingar vóru um sølu av bygninginum, men einki var komið upp á pláss tá. Nú er sølan so veruleiki, og keypari er Ludvík Petersen í Havn, sum hevur Bilfríðkan, og tí kann væntast, at tað í næstum verður møguligt at keypa bilar í Gøtudali.

### Leita eftir øki til nýggjan bygning

Magnus Gregersen, stjóri í Aluplast, vil ikki upplýsa prísin á bygninginum, men hann sigur tó, at teir eru vælnøgdir við søluna.

- Eg haldi, at eg kann siga, at vit hava fingið ein góðan prís, og nú skulu vit so út at leita eftir einum øki, har vit kunnu byggja ein nýggjan bygning. Vit skulu brúka eitt grundøki, sum er okkurt um 2.000 fermetrar til støddar, og á økinum fara vit at hava ein bygning, sum skal verða góðar 1.000 fermetrar stórur, sigur Magnus Gregersen.

Hann sigur, at hjá Aluplast er tað ikki altavgerandi, at nýggi bygningurin kemur at verða í Gøtu, tí hann kann eins væl standa í til dømis Havnini.

Spurdur hví teir hava selt gamla bygningin, sigur Magnus Gregersen, at gamli bygningurin var ógvuliga ótíðarhóskandi, og tí er neyðugt við nýggjum hølum.

Í løtuni starvast eini 25-30 fólk hjá Aluplast, men Magnus Gregersen væntar, at í framtíðini kunnu eini 40 fólk starvast hjá fyritøkuni í nýggjum hølum.



*Ludvík Petersen í Havn, sum hevur Bilfríðkan, hevur keypt bygningin hjá Aluplast í Norðagøtu*